MENTAMÁLARÁÐIÐ *VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN*

**Dagur:** 05. januar 2004
**Skrátal:** 44202/2
**Máltal:** 020783/7

## Handilsskúlin

*Lesiætlan* *Januar 2004*

# Vinnulívsrættur C

*Endamálið*

**1.** Endamálið við lærugreinini er at geva næmingunum vitan um meginreglurnar innan vinnulívsrættarliga økið. Lærugreinin tekur støði í føroyskum rættarkeldum, men leggur samstundis dent á at síggja føroysku løgfrøðina í altjóða høpi, her í millum sambandið við Danmark. Grundarlagið fyri lærugreinini eru rættarreglurnar, ið eru galdandi í viðurskiftunum hjá likamligum og løgfrøðisligum persónum í vinnulívinum.

*Undirvísingin*

**2.1** Undirvísingin verður skipað við støði í ymiskum evnum, ið verða lýst nærri við stakdømum. Stakdømini skulu lýsa nútímans løgfrøðilig viðurskifti, har viðkomandi løgspekilig, siðfrøðilig og altjóða sjónamið verða tikin uppí. Hóskandi KT-amboð og teldutøkar keldur verða nýttar, og løgfrøðilig greiðsluevni innan KT verða viðgjørd.

**2.2** Næmingurin verður *kunnaður* um meginreglurnar í
- føroyskum fiskivinnurætti
- skipaskráseting
- altjóða løgfrøðisligum viðurskiftum, her í millum varnating og lógarval
- setanar- og arbeiðsmarknaðarviðurskiftum
- skaðatrygging
- kappingarlógini

**2.3** Næmingurin fær *innlit* í
- rættarkeldur, og hvussu hesar verða til, eins og tey sjónarmið av løgspekiligum, siðfrøðiligum og altjóða slagi, ið liggja til grund fyri rættarreglum
- meginreglur innan KT-rætt og reglur um gjaldskort

**2.4** Næmingurin gerst *førur fyri sjálvstøðugt at nýta og viðgera* reglurnar innan
- endurgjald
- avtalurætt
- keyp og sølu
- kredittrygd og fígging av fastari ogn
- krøv og heftilsi
- skuldarinnheinting og húsagang
- tinglýsing

*Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta-, og kirkjumál*
MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO

*Innihaldið í undirvísingini*

3.1 *Endurgjald*
Meginreglur fyri endurgjald uttanfyri avtalu og um vøruábyrgd verða viðgjørdar, so næmingurin fær innlit í týðandi reglur innan økið. Kunnað verður um skaðatrygging.

3.2 *Avtalur*
Kunnað verður um meginreglurnar fyri avtalu, stovnan, ógildi og fulltrú, soleiðis at næmingurin fær innlit í, hvussu hetta fer fram, og dugir at tulka hesar reglur.

3.3 *Keyp og søla av vørum og tænastum*
Reglurnar fyri keyp og sølu verða viðgjørdar, serliga við atliti at levering, mishaldi og mishaldsheilmildum, so næmingurin er førur fyri sjálvstøðugt at meta um tey løgfrøðisligu viðurskiftini, ið gera seg galdandi, tá keypt og selt verður. Næmingurin fær somuleiðis innlit í meginreglurnar fyri gjaldshættir og gjaldskort.

3.4 *Keyp og søla av fastari ogn*
Reglurnar um keyp og sølu av fastari ogn verða lýstar, serliga við atliti at tinglýsing og veð, so næmingurin dugir at nýta og viðgera reglurnar. Kunnað verður um meginreglurnar fyri skipaskráseting.

3.5 *Altjóða viðurskifti*
Kunnað verður um:

- ES og um, hvussu ES-avgerðir og altjóða sáttmálar ávirka galdandi reglur í Føroyum og Danmark.
- meginreglurnar í heimastýrislógini og løgfrøðisliga sambandið millum Føroyar og Danmark
- altjóða varnating og lógarval

3.6 *Kredittrygd og av- og niðurskriving av skuld*
Reglurnar um borgan, ognarfyrivarni og um veð í leysafæ og krøvum verða lýstar, umframt um heftilsi hjá likamligum og løgfrøðiligum persónum, so næmingurin dugir at nýta og viðgera reglurnar um kredittrygd. Næmingurin skal í sínum arbeiði ogna sær kunnleika um reglurnar um skuldarinnheinting, niðurskriving av skuld, gjaldssteðg og reglurnar um húsagang.

3.7 *Setanarviðurskifti og arbeiðsmarknaðarviðurskifti*
Kunnað verður um meginreglurnar um setanar- og sáttmálaviðurskifti á arbeiðsmarknaðinum. Kunnað verður um frítíðarlóggávuna.

3.8 *Fiskivinnulóggáva*
Kunnað verður um meginreglurnar innan vinnuligan fiskiskap, her í millum um fiskidagaskipanina, umsetiligheit og lóggávu um fiskaaling og havbúnað.

3.9 *Valfrítt evni*
Í undirvísingarárinum verða umleið 10 pultstímar nýttir í flokkinum til arbeiði við valfríum evni. Næmingar og lærari velja evnið í felag við atliti at áhuga, tørvi og ynski hjá næmingunum. Endamálið er at geva næmingunum høvi at arbeiða meira nágreiniliga við einum evni frá undirvísingini ella at taka upp nýtt evni, eitt nú í tvørfakligum høpi.

**3.10** *Lesipensum*
Í sambandi við evnini, sum eru nevnd undir **3.1** - **3.9**, verða lisnar umleið 250 normalsíður.

*Próvtøkan*

**4.1** Hildin verður ein munnlig próvtøka.

**4.2** Munnliga próvtøka fevnir um próvhoyring í próvtøkupensum. Próvtakarin fær umleið 20 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða hoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**4.3** Próvtakararnir verða próvhoyrdir í ítøkiligum uppgávum, ið taka støðið í ókendum tilfari.

**4.4** Næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, geva upp til próvtøkuna umleið 150 normalsíður av lesipensum.

**4.5** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**4.6** Til fyrireikingina skal próvtakarin hava útflýggjað rein eintøk av teimum uppgávunum, sum hann skal arbeiða við. Í fyrireikingarrúminum kann próvtakarin nýta egnar uppskriftir og alt tilfar, sum er tilskilað í lesipensum. Til tess at styðja framløguna kann próvtakarin undir próvhoyringini brúka tær uppskriftir, hann hevur gjørt í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplestur telur ikki uppeftir í dømingini.

**4.7** Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin dugir at greina og lýsa týðandi tættir í uppgávunum, her í millum at nýta neyðug og viðkomandi løðfrøðilig hugtøk, og at duga at síggja uppgávurnar í mun til dagligt, vinnuligt virksemi og at samanbera tær við hetta.

**4.8** Givið verður eitt próvtal fyri munnliga avrikið. Próvtalið verður givið við støði í einari heildarmeting.